Handverkari

søkist til

Elfelagið SEV

Søkt verður eftir einum handverkara at arbeiða sum linjumaður hjá SEV.

Arbeiðsøkið verður fyri meginpartin í Suðurstreymoy. Arbeiðið fevnir um hald og nýgerð av linjum, kaðalum og trafostøðum.

Handverkarar við sveinabrævi sum elektrikarar hava fyrimun, men kunnu fólk við aðrari handverkaraútbúgving eisini koma upp á tal, t.d. jarn- og húsasmiðir.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petur L. Gaardbo hjá SEV á tlf. 311366.

Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 14. januar 2001.

Elfelagið SEV

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
BERGUR
Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

pf Maria Poulsen
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sosialurin 311820

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Sløkkiliðsstjóri

Tórshavnar kommuna søkir eftir sløkkisliðsstjóra at byrja skjótast gjørligt.

Starvið/ábyrgd
Sløkkiliðsstjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni á brandstøðini og verkstaðnum.

Sløkkiliðsstjórin hevur tilvísing til tekniska stjóran og í sambandi við brunanevndina borgarstjóran, sum er formaður í nevndini.

Høvuðsuppgávur
- Umsitingarligur støðleiðari
- Lógarkravdur limur í brunanevndini
- Skrivari í brunanevndini
- Brunateknisk byggimálsviðgerð/umsjón
- Fíggjarliga ábyrgd
- Tilbúgvingarætlan
- Starvsfólkarøkt
- Útbúgving og venjing hjá sløkkiliðsmanningini
- Skipa fyri skeiðum
- Umboð býráðsins í bólkinum viðvíkjandi koyring fyri MBF

Førleikakrøv
Roknað verður við, at umsøkjarin hevur:
- førarabræv til akfar yvir 3.500 kg
- víðkað prógv í fyrstuhjálp
- heilsuváttan fyri sløkkiliðsfólk
- prógv frá sløkkistjóraskúla við nøktandi úrsliti sum brunaumsjónarmaður (brandinspektør). Hevur tú ikki prógvið, skal tað takast innan 2 ár
- nøktandi revsiváttan
- áræði, arbeiðssemi, góð samstarvsevnir og er fyrikomandi.

Setanarviðurskifti
Starvið er starvsmannastarv og lønt í 35. lønarstigi í tænastumannasáttmálanum.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

Umsókn
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 14. januar 2002. Viðmerk á umsóknina "Sløkkiliðsstjóri".

SNARSKIVAN

sosialurin sosialurin

STARV sosialurin

Sosialinum tørvar blaðfólk

Hevur tú hug at royna teg á einum arbeiðsplássi, har tað er ferð á allan dagin, har ein deadline er partur av hvørjum einasta arbeiðsdegi, og har tú allatíðina fært nýggjar og spennandi uppgávur, so er hetta kanska møguleikin hjá tær.

Okkum tørvar blaðfólk, og vit bjóða eitt hendingaríkt og fjølbroytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi redaktión og sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Seinastu tíðina hava vit økt um virksemi við at skriva tíðindi til www.portal.fo. Hetta hevur eisini ført til økt krøv til redaktiónina, men er eisini við til at menna tíðindaflutningin, sum støðugt verður dagførdur á internetinum.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella journalistiskum royndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, og at tú fylgir væl við í tí, sum hendir og rørist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna, umframt støðugu tíðindi á internetinum.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan mánadagin 8. januar 2002. Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. (GG: Hetta er sama starv, sum varð lýst leyst síðstu viku í november. Eftir áheitan er freistin longd)

Mentamálastýrið

Stongt verður millum jól og nýggjár. Opið verður aftur mikudagin 2. januar 2002.

Mentamálastýrið

Havnar Arbeiðskvinnufelag

Vit ynskja limum okkara við húski og viðskiftafólkum annars eini góð og hugnalig jól og eitt eydnuberandi nýggjár við tøkk fyri skjótt farna árið.

Nevndin

Lesið Sosialin - tað loysir seg

Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og alt gott í komandi ári

D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310600

Sølufólk søkist

Vestmanna Timburhandil søkir eftir royndum sølufólki at byrja skjótast tilber.

Arbeiðsøki:
Viðkomandi kemur at hava um hendi alt vanligt søluarbeiði. Av arbeiðuppgávum kunnu nevnast:
- samskifti við viðskiftafólk
- ger av tilboðum
- avgreiðsla
- menning av søluvirksemi

Førleikakrøv:
- kunnleika til byggivinnuna
- royndir innan økið
- kunna arbeiða sjálvstøðugt

Vit kunnu bjóða:
- eitt spennandi og sjálvstøðugt arbeiði í eini fyritøku í vøkstri, við nógvum og fjølbroyttum arbeiðsuppgávum.
- eitt gott arbeiðsumhvørvi, har nóg mikið er at tríva í
- løn sambært avtalu

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja á **tlf. 424170**.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í **seinasta lagi 20. januar 2002**.
Umsókn saman við viðkomandi skjølum skulu sendast til:

P/F Vestmanna Timburhandil
FO-350 Vestmanna

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3263, P/F Kollafjord Pelagic, 410 Kollafjørður.

Viðtøkur broyttar: 14.12.2001.
Nýtt hjánavn: P/F K-Fish (P/F Kollafjord Pelagic)

Skráseting Føroya tann 19. desember 2001

Kristin Balle

i Sosialurin

Kvinnur sum íbirtarar

Várhálvuna 2002 skipa Skeiðsdepilin við Marknagil og Menningarstovan fyri skeiði sum skal fremja møguleikarnar hjá kvinnum at stovna egna fyritøku. Byrjað verður 6. feb.

Endamálið við skeiðnum er m.a.:
- at luttakarar fáa kunnleika til hvussu ein fyritøka verður stovnað og rikin,
- at styrkja førleikan hjá luttakaranum at meta um og arbeiða við egnum vinnuhugskotum
- at leiðbeina um, hvar vitan um vinnu fæst,
- at gera eitt samstarvsnet millum kvinnur í Føroyum í somu ella líknandi støðu og millum vinnuhugaðar kvinnur og vinnulívið.

Skeiðið verður lutað sundur í fyrilestrar og uppgávutímar. Í uppgávutímunum verður dentur lagdur á, at luttakararnir gera virkisætlanir, sum kunnu taka støði í egnum vinnuhugskotum. Ráðgevi/-ar verða við stóran part av tíðini at hjálpa til og vegleiða tínari ætlan.

Kvinnur, sum hava ætlanir um at fara undir og/ella longu hava egna fyritøku, verða bidnar um at venda sær til Skeiðsdepilin við Marknagilsvegin at fáa umsóknarblað um upptøku á skeiðnum.

Fyri at tryggja dyggastu leiðbeining verður í sambandi við umsóknina biðið um stutta frágreiðing um vinnuhugskotið. Henda verður hildin í trúnaði.

Kostnaðurin er 4.500 kr.

Seinasta freist at boða frá luttøku er 10. jan. 2002
Nærri fæst at vita við at venda sær til

SKEIÐSDEPILIN VIÐ MARKNAGIL * SDM
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

Pedagogur/-starvsfólk til Rókina

Á Rókini, ið er bústovnur undir Almanna- og Heilsumálastýrinum, er 1 fulltíðarstarv leyst at søkja til 1. feb. 2002.

Rókin er ein landsstovnur fyri 5 børn/ung við m.a. skúla- og sosialum trupulleikum.

Vit vænta, at viðkomandi, ið settur verður, er førur fyri at arbeiða í sera tættum samstarvi við bæði vaksin og børn og er opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum.

Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi útbúgving/royndir og verður løntur eftir sáttmála millum fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 14. jan. 2002.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Súsan Johansen fyristøðufólk á tlf. 31 89 14.

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

Fyribilsskattaskráin 2002
Fríir ágóðar v.m.

Hjá teimum, sum hava ymisk framihjárættindi sum part av lønini, ásetir Toll- og Skattaráð Føroya eina ferð um árið virðið á hesum hlunnindum, og eru virðini fyri 2002 hesi, íroknað meirvirðisgjald:

a)	Virðið á fríum bústaði:		
	íbúð (partur av húsum) pr. m²	kr.	441
	íbúð (heil hús) pr. m²	kr.	347
b)	Eginnýtsla av el	kr.	6.700
c)	Eginnýtsla av olju	kr.	13.800
d)	Frí telefon	kr.	4.500
e)	Virðið á fríum kosti pr. dag:		
	3 máltíðir	kr.	85
	2 máltíðir	kr.	65
	1 máltíð	kr.	47
f)	Virðið á fríum bili:		
	1100 kg og undir	kr.	43.500
	1101 kg til 1300 kg	kr.	54.000
	1301 kg og meira	kr.	66.000
	Allir aðrir bilar, sí viðmerking til "Allir aðrir bilar"	kr.	32.625/21.750

Eginnýtsla hjá privatum vinnurekandi

Privatur vinnurekandi skal skatta av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.

Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skatta av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til privatnýtsluna, tá tað snýr seg um t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

Meginreglan er tann, at skattgjaldarin sjálvur skal gera eina neyva metan av, hvussu nógv er privat, og hvussu nógv er vinnulig nýtsla, og skal henda metan vera við atliti til støðið á t.d. húsi og húski.

Sum leiðbeinandi minstamark hevur Toll- og Skattaráð Føroya tí ásett hesi virði fyri nýttar vørur:

g)	Eginnýtsla av vørum:		
	Bakarar	kr.	6.700
	Bakarar við keypmansvørum	kr.	8.800
	Keypmenn	kr.	23.300
	Privatnýtsla av bili/bussi upp til 10 persónar hjá hýruvognsførarum	kr.	16.000
h)	Renta á partaeigaralánum hjá høvuðspartaeigarum:		9%
i)	Kapitaleftirlønarfrádrátturin er hægst	kr.	43.500
j)	Skattafrádráttur fyri donsk lesandi	kr.	62.000

Viðmerking til "Allir aðrir bilar" undir f)

Almennir fundir

Hvalvíkar bygdarráð hevur á fundi 10.12.2001 samtykt, at almennu bygdarráðsfundirnir fyri ár 2002 verða hildnir hesar mánadagar kl. 19.00 á kommunuskrivstovuni:

14. januar	15. juli
18. februar	19. august
18. mars	16. september
15. apríl	14. oktober
13. mai	18. november
17. juni	16. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdarráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fundin.

Hvalvíkar Bygdarráð